## Fáa væl av lakssild



Íslendsk uppisjóvarskip hava fiskað góð 10.000 tons av fiskaslagnum lakssild í vetur. Skipini landa fiskin til ídnað, og Morgunblaðið skrivar, at tað hevur gingið væl at arbeiða fiskin. Roynt verður at fáa sum mest av vætu úr fiskinum, áðrenn hann verður virkaðu til mjøl, og tað ger, at mjølið verður ikki so salt, skrivar blaðið. Lakssild er fiskur, sum livir í øllum heimshøvunum burtursæð frá teimum kaldastu. Lakssild verður í mesta lagi níggju centimetrar langur. Føroyska skipið Finnur fríði landaði góð 200 tons av lakssild í Fuglæafirði í fjør, og tá varð myndin her á síðuni tikin.

## Ryanair ger um seg

Írska lágprísflogfelagið Ryanair hevur havt stóra framgongd, síðani tað fór undir flúgving í Noregi, og leiðslan ivast ikki í, at vøksturin fer at standa við. Ryanair væntar, at flogførfelagsins fara at flyta 2,6 milliónir fólk til og frá norskum flogvallum í ár, og tað er hálva aðru ferð meiri enn í fjør. Nú ætlar felagið at fara undir nýggjar rutur millum Noreg og Italia, Frakland, Bretland og lond í Eysturevropa. Ryanair varð stovnað í 1985. Í dag hevur felagið meiri enn 950 rutur millum 151 flogvallir í 26 evropeiskum og norðurafrikonskum londum. Í fjør flutti felagið 66 milliónir ferðafólk.

# Leita eftir pápum í Føroyum

**Í Grønlandi býr ein hópur av fólki, sum ikki veit, hvør pápi teirra er. Tað skuldi verið løgið, um ikki onkrir pápar av grønlendskum børnum búgva í Føroyum, sigur Klaus Fredriksen í Nuuk. Hann fer nú saman við øðrum at stovna felag fyri hesi foreldraleysu børnini**

UPPRUNI
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Óivað eru ella hava verið fleiri føroyskir menn, sum eiga ella hava átt børn í Grønlandi, tí áður vóru nógvir føroyingar í Grønlandi við skipum, og fleiri føroyingar róðu eisini út har.

Tí hava Føroyar eisini áhuga hjá grønlendingum, sum eru farnir at leita eftir sínum uppruna uttanlands.

Serliga í 50-árunum og 60-árunum var eitt ótal av útlendskum skipum javnan inni í grønlendskum havnum, og tað var vanligt, at sjómenninir fóru í land og funnu sær gentur.

Gjøgnum árini hava eisini nógvir fremmandir handverkarar verið har.

### Faðirloysingar

Í Nuuk er nú ætlanin at stovna eitt felag fyri grønlendingar, sum ikki vita, hvør pápi teirra er. Tey rokna seg sum faðirleys.

- Vit, sum fødd eru uttan fyri hjúnarlag og hava pápa uttan fyri Grønland, hava eingi rættindi til at leita eftir pápum okkara, sigur Klaus Frederiksen.

Sjálvur er hann so væl fyri, at mamma hansara altíð hevur verið opin og segði honum, hvør pápin var, og tað eydnaðist honum at fáa innlit í málið, so hann fann danska pápan, sum í sínari tíð arbeiddi í Grønlandi.

So væl hevur ikki gingið hjá øllum, og torført er hjá teimum at koma víðari, tí dópsvattanin sigur einki, tey hava ongan at spyrja, og ein donsk lóg sigur, at lok er lagt á málini.

Danska lógin er ikki í samsvari við, at Danmark hevur undirskrivað ST-sáttmálan um, at øll børn hava rætt til at kenna uppruna sín, sigur Klaus Frederiksen.

### Heilt nógv fólk

Herfyri hittust nøkur av "faðirleysu børnunum" á fundi i Nuuk, og tað møttu 28 fólk. Klaus Frederiksen heldur, at tvær ferðir so nógvir grønlendingar í somu støðu eru bara í Nuuk, og hópur aftrat aðrastaðni í landinum. Síðan fundin hevur hann frætt úr Grønlandi frá heilt nógvum fólkum, sum kenna trongd til at finna útav, hvør pápi teirra er, og um tey kanska ikki eisini hava hálvsystkin.

- Tað hevur so nógv at siga fyri øll menniskju at vita, hvørji tey eru, sigur Klaus Frederiksen, sum vónar, at henda áheitan fær klokkurnar at ringja onkrastaðni í Føroyum.



*Klaus Frederiksen, sum er stigtakari til at stovna felag í Grønlandi, fann fram til danska pápa sín. Pápin arbeiddi í sínari tíð í Grønlandi. Teir hava hitst nakrar ferðir*

## Byrja í mars at byggja røktarheimið

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Vestmanna kommuna fekk tilboð frá tveimum lánistovnum upp á lán til røktarheimið, og fíggjarnevndin fekk heimils til at samráðast við teir.

Men áðrenn nærri støða verður tikin til lántøkuna, skulu tilboðini latast upp. Áheitanrir um at vera høvuðsupptakari skulu verða inni 3. februar, og tilboðini upp á jørð- og vegarbeiði 16. februar.

Karl A. Olsen, borgarstjóri væntar, at arbeiði kann byrja í mars.

Vestmanna kommuna hevur frá Fíggjarmálaráðnum fingið loyvi til at læna upp til 22 mío. krónur til røktarheimið, sum skal hava 24 pláss.



*Upprunaliga ætlaðu Kvívíkar kommuna og Vestmanna kommuna í felag at byggja røktarheim, men Kvívík tók seg úr samstarvinum, og vestmenningar fara tí nú at byggja sítt egna røktarheim*

## Nøgdsemiskanning gerast av stovnum í Klaksvík

**Hvør barnaansingarstovnur í Klaksvík sær skal finna fíggjing til eina nøgdsemiskanning av stovnunum**

NØGDSEMI
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Á sama hátt sum býráðið í Havn læt gera eina nøgdsemiskanning av barnaansingini í kommununi, skal nú eisini ein kanning gerast av barnaansingarstovnunum í Klaksvík.

Tað samtykti býráðið á fundi týskvøldið.

Hvør stovnur skal finna 10.000 krónur til kanningina av fíggjarætlan síni.

Gunvá við Keldu, borgarstjóri í Klaksvík ætlar at forða fyri, at stovnarnir verða settir upp móti hvør øðrum, tá ið kanningin er av.

- Tað er ógvuliga keðiligt, um foreldur fara at frávelja ein stovn út frá kanningini, tí stovnurin kann vera góður, um aðrir stovnar fáa betri viðmæli. Heldur skal kanningin brúkast sum eitt hent amboð, so peikast kann á, hvat kann gerast betur, sigur Gunvá við Keldu.